**Útboð**

av uppgávuni at senda tingvarpið sum FM-útvarp

Løgtingið hevur gjørt av at kanna, hvørt tað í 2020 er gjørligt at varpa tingfundir út í FM-útvarpi, soleiðis at fólk, sum ikki sita við sjónvarpið ella við eina teldu, eisini hava høvi at hoyra tingfundirnar. Hetta kann t.d. vera fólk umborð á útróðrarbátum ella fólk, sum koyra í bili. Uppgávan at senda tingvarpið sum FM-útvarp verður tí boðin út alment til teirra, sum hava áhuga at røkja hesa vegna Løgtingið.

**Treytir:**
Tað er ein treyt, at sent verður frá øllum tingfundum, og at tingfundirnir so vítt gjørligt hoyrast á FM um alt landið og á sjónum runt um oyggjarnar út á uml. 25 fjórðingar.

Tilboðsgevar skulu í tilboðnum lýsa:

- Hvussu teir fara at loysa uppgávuna, og nær hendan loysn er klár at seta í verk.
- Hvussu stóran part av landinum sendinet teirra røkkur, og hvar tað møguliga ikki hoyrist.
    - Ein lýsing av dekninginum skal viðleggjast.
- Hvussu útbreiðslan fer at vera á sjónum, og hvar tað møguliga ikki hoyrist.
    - Ein lýsing av dekninginum skal viðleggjast.
- Hvussu nógv hendan uppgávan fer at kosta Løgtinginum, íroknað møguligar íløgur og rakstur fyrstu 5 árini.

Tað er eitt krav, at veitarin er ein føroyskt skrásett fyritøka, sum rekur sítt virksemi í Føroyum. Veitarin skal, áðrenn uppgávan verður sett í gongd, kunna vátta, at fyritøkan ikki hevur nakað figgjarligt útistandandi við skatta- og tollmyndugleikarnar og skal eftir umbøn kunna lata Løgtinginum eina útgreining av fíggjarviðurskiftum sínum, tvs. roknskapartøl fyri seinastu 3 árini.

**Viðgerð og meting av møguligum tilboðum:**
Møgulig tilboð upp á uppgávuna skulu vera Løgtinginum í hendi í seinasta lagi 2. desember 2019. Hesi kunnu sendast Løgtinginum við telduposti til logting@logting.fo ella við vanligum brævi til Løgtingið, Postsmoga 208, 110 Tórshavn.

Í viðgerðini av innkomnum tilboðum fer Løgtingið at viga hesi soleiðis:

- Kostnaðurin vigar 50%
- Dygdin vigar 50%, harav
    - Útbreiðslan vigar 40%
    - Útgerðin vigar 5%
    - Byrjanardagurin vigar 5%

Løgtingið tilskilar sær rætt til at velja millum innkomnu tilboðini, og um neyðugt ikki at taka av nøkrum teirra.